

# Teknikari

Til verkstað okkara søkja vit eftir einum teknikara at byrja skjótast til ber. Sum partur av tænastudeild okkara kemur tú fyrst og fremst at takast við tænastuveiting og umvælingar av kopimaskinum, printarum og telefaksum. Á hesum øki gongur menningin frá analogum eindum til størri digitalar loysnir, har Farodane, sum Canon umboð í Føroyum, hevur eitt breitt og framkomið útboð.

Við hesum starvi gerst tú sostatt partur av eini deild í støðugari og spennandi menning.

***Vit vænta at tú:***
- ert álítandi og fyrikomandi
- ert til reiðar at taka ímóti nýggjum avbjóðingum
- hevur viðkomandi royndir innan økið
- hevur viðkomandi útbúgving - hetta er tó ikki krav

***Vit kunnu bjóða tær:***
- eitt spennandi og avbjóðandi starv
- støðuga útbúgving á økinum
- eitt gott arbeiðsumhvørvi í eini sunnari fyritøku í menning
- 40 góðar arbeiðsfelagar

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. januar 2001. Lønarviðuskifti verða avtalað í samráð við leiðsluna.

farodane 01-01

FARODANE

Brekkutún 4
Postboks 109
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311414
Fax 317534
e-postur:
farodane@farodane.fo
www.farodane.fo

*Farodane er 50 ára gamalt handils- og tænastuvirkið, sum í dag er ein av fremstu heildarveitarum til skrivstovuna. Virksemið fevnir um sølu og tænastu av framkomnum KT-loysnum, kopi-, fax- og AV-tólum, skrivstovuinnbúgvi og øðrum skrivstovubúnaði.*

**Mentamálastýrið**
*Starvsfólkadeildin*

# Landsmiðstøðin

Av tí at leiðarin í Landsmiðstøðini fer í annað starv, og honum er játtað farloyvi til 31. juli 2002, er leiðarastarvið í Landsmiðstøðini leyst at søkja til fyribils- setan tíðarskeiðið 1. apríl 2001 – 31. juli 2002.

Landsmiðstøðin er ein stovnur í undirvísingarverkinum undir Mentamálastýrinum.

**Landsmiðstøðin skal:**
- ráðgeva og upplýsa um undirvísaringmiðlar,
- ráðgeva og veita hjálp í fakligum, námsligum og tøkniligum spurningum,
- virka fyri fakligari, námsligari og tøkniligari menning í skúlunum,
- læna út undirvísingarmiðlar og bókmentir í náms- og sálarfrøði,
- hava námsligan verkstað, bæði til egið virksemi og til tænastu og nýtslu hjá skúlum og lærarum,
- ráðgeva skúlum og veita teimum hjálp at skipa mentanarlig tiltøk í undirvísingarligum høpi.

**Landsmiðstøðin kann**
- veita skúlum og øðrum undirvísingarstovnum bókasavnstøkniliga tænastu,
- útvega skúlunum undirvísingarmiðlar, herímillum einhvønn bráðfeingis miðil, evnissavn o. t.
- røkja aðrar uppgávur í undirvísingarverkinum eftir avtalu við Mentamálastýrið.

Umsøkjari skal hava læraraútbúgving og kunnleika um alt undirvísingarverkið. Royndir í skúlabókasavnsarbeiði kunna verða ein fyrimunur.

Tað er ein fyrimunur, at umsøkjari hevur royndir í øðrum viðkomandi starvi. Harumframt skal umsøkjari kunna arbeiða bæði sjálvstøðugt og saman við øðrum.

Tann, sum settur verður, kemur sjálv/sjálvur í stóran mun at arbeiða sjálvstøðugt og at vera dagligur leiðari hjá lærugreinaráðgevunum á fólkaskúlaøkinum.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir eru góðir fyri persónligari og fakligari menning til eftirútbúgving o. a.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Setanarøkið fatar um Mentamálastýrið við tilvísing til deildarstjóran í Fólkaskúladeildini.

Umsókn við prógvum o. ø. skal verða send Mentamálastýrinum, Hoyvíksvegi 72, Postrúm 3279, 110 Tórshavn, skjótast til ber og soleiðis, at hon er Mentamálastýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. februar 2001.

*Vilja tygum hava fleiri upplýsingar um starvið, kunnu tygum ringja til Hensar Ellingsgaard, deildarstjóra, telefon 35 5050 í Mentamálastýrinum.*

*Mentamálastýrið fyrisitur undirvísingarmál, gransking, mentamál, kirkjumál, loftmiðlar, ítrótt og annað frítíðarvirksemi. Landsmiðstøðin er stovnur undir Mentamálastýrinum og veitir skúlum tænastur í undirvísingarverkinum við atliti at undirvísingarmiðlum, hevur verkstaðarmøguleikar og umsitur lærugreina-ráðgevaskipanina. Dentur verður lagdur á framvegis at menna virksemið í Landsmiðstøðini.*

# Skriviverkstaðurin
# LivaSkriva

á Háskúlanum
Mikukvøldini frá 7. februar til 16. mai
millum kl. 19 og 22

*Stuttprosa & Stuttsøga:*

- Gjøgnumgongd av egnum og øðrum tekstum
- Lærið at geva einum fiktivum persóni lív
- Farið verður út at savna søgutilfar

Fortreytir: Forvitni & áhugi!
Kostnaður: kr. 1.500,-
(lesandi kr. 950,-)
Lærari: Oddfríður M. Rasmussen
Tlf. 312430

Tilmelding:

**Føroya Fólkaháskúli**
**Háskúlavegur 14 - FO 100 Tórshavn**
**Telefon 31 17 43 - Telefax 31 96 87**

**Føroya Postfelag**

# Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður í HB-húsinum **leygardagin 17. februar 2001, kl. 10.00**

Dagsskrá sambært lógum felagsins.

Uppskot, ið ynskjast viðgjørd á aðalfundinum, skulu vera send felagnum í seinasta lagi 3 vikur undan aðalfundinum – **t.e. leygard. 27. jan. 2001.**

**Nevndin**
**Føroya Postfelag**

Sosialurin -har tað hendir

# Eiðis kvøldskúli

Í vár skipar Eiðis kvøldskúli fyri frálæru í:

**Seyming til føroyskan búna.**

Lærari: Katrin Haraldsen, tlf. 42 34 88

Tíð eftir avtalu.

Luttøkugjaldið, sum skal gjaldast fyrsta kvøldið, er kr. 100,-.
Tekning fer fram hjá læraranum í seinasta lagi fríggjadagin 26. januar 2001.

Undirvísingin er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning frá myndugleikunum.

**Eiðis kvøldskúli**
Tlf. 423092 · Fax 423480



***NORÐÍS Seafood P/F***

# Framleiðsluleiðari

Til flakavirkið hjá NORÐÍS Seafood P/F á Eiði, verður við hesum sókt eftir framleiðsluleiðara.

**Starvið**
umfatar dagliga ábyrgd av framleiðsluni á virkinum eftir nærri ásetan av virkisleiðsluni, herundir at fáa til vega alt tilfar sum verður nýtt í og til framleiðsluni.
Eisini hevur framleiðsluleiðarin ábyrgd av fremjanini av Innaneftirlitinum á virkinum.

**Kravt verður**
at Framleiðsluleiðarin er arbeiðsamur, nærlagdur og er førur fyri í stóran mun at arbeiða og taka avgerðir sjálvstøðugt.

**Setanin**
verður framd skjótast gjørligt og verður løn og treytir ásett eftir eftir nærri avtalu.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til virkið og spyrja eftir Jóhan Páll ella Petur.

**Umsókn**
saman við viðkomandi skjølum og viðmælum kann sendast til:

**NORÐÍS Seafood P/F**
470 Eiði

*NORÐÍS Seafood P/F eigur og rekur flakavirkið á Eiði. Árliga tekur virkið ímóti umleið 2.500 tonsum av ráfiski. Á virkinum eru umleið 45 ársverk.*

**NORÐÍS Seafood P/F, Tlf 423583 – Fax 423584**

# Dansifrøi



## Ársveitsla

**Ársveitslan verður í Hoydølum leygarkvøldið 20. januar 2001.**
Borðhaldið byrjar kl. 19.30.
Orkestur spælir til dans.

Atgongumerki, sum kosta 275 kr., fáast til keyps í Mótaskálanum í Dr. Jacobsensgøtu ella hjá nevndarlimunum.

**Avgjørt seinasta freist at keypa atgongumerki er mikudagin 17. januar.**

## Ársaðalfundur

Mint verður eisini á ársaðalfund felagsins, sum verður sunnudagin 28. januar 2001, kl. 15.00 á Hotel Hafnia.

Við dansikvøðu

**NEVNDIN**

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

**Fiskaaling P/F**
**Við Áir**
**FO-430**

# Kynbótaleiðari á Fiskaaling P/F

Av tí at leiðarin fyri kynbótaarbeiðnum hjá Fiskaaling P/F er farin í annað starv, er eitt áhugavert og fjølbroytt starv leyst at søkja á Fiskaaling P/F.

Viðkomandi, ið settur verður, kemur at hava dagligu ábyrgdina av kynbótaarbeiðnum, og skal skipa og leggja hetta til rættis soleiðis, at arbeiðið verður framt undir tryggum og skipaðum umstøðum, soleiðis at allar neyðugar skrásetingar verða gjørdar og goymdar trygt til seinni nýtslu, í samband við úrvalið. Eisini kemur viðkomandi at hava ábyrgdina av samstarvinum við alistøðirnar, har merktur fiskur burtur úr kynbótaarbeiðnum verður aldur og skrásetingum av vekt, lit, kynsbúning og skap skulu verða gjørdar, tá laksurin verður tikin. Við støði í øllum skrásetingum sum gjørdar eru av hvørjum árgangi, skal kynbótaleiðarin síðan skipa fyri og gera familjuúrvalið.

Tann ið settur verður, kemur at arbeiða í einum mennandi arbeiðsumhvørvi saman við góðum starvsfeløgum og fær møguleikar at menna seg víðari, við at luttaka á ymsum skeiðum uttanlands.

**Førleikakrøv**
Vit hugsa okkum, at tann sum settur verður, hevur útbúgving frá hægri lærustovni og hevur holla vitan innan arvalæru, støðd- og hagfrøði.

Hevur tú hug til stórar avbjóðingar, eitt ábyrgdarfult, viðkomandi og mennandi starv innan føroysku alivinnuna, kunnu vit bjóða tær alt hetta, umframt góðar arbeiðsumstøður og møguleika at menna teg víðari.

Starvið verður sett skjótast gjørligt, men vit hava hinvegin tíð at bíða nakað eftir rætta viðkomandi. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu, í mun til útbúgving og starvsroyndir.

Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast P/F Fiskaaling, Við Áir, FO 430 Hvalvík, í seinasta lagi 1. februar 2001. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at seta seg í samband við P/F Fiskaaling, Símun Joensen, stjóra, telefon 474747 ella 21 4747, ella við telduposti: simun.joensen@fiskaaling.fo

# Leiðari til kalvaalingina hjá P/F Fiskaaling

Í samband við at felagið er farið undir at menna aling av kalva, er eitt áhugavert og fjølbroytt starv leyst at søkja á P/F Fiskaaling.

Viðkomandi, ið settur verður, kemur at hava dagligu ábyrgdina av at menna kalvaalingina í felagnum, og skal skipa og leggja hetta til rættis soleiðis, at arbeiðið verður framt undir tryggum og skipaðum umstøðum.

Í sambandi við at felagið nú er farið undir eina verkætlan sum hevur sum endamál at menna kalvaaling í Føroyum byggir felagið í løtuni eina støð til hetta endamál. Men hóast henda støð í fyrstu atløgu er ætlað til kalva verða her eisini skaptir møguleikar fyri at fara undir menning av øðrum fiska – og djórasløgum. Tann, ið settur verður í starv, fær tí eisini, saman við stjóra felagsins, ábyrgdina av at menna aling av øðrum fiska – og djórasløgum sum felagið møguliga fer undir komandi árini.

Tann ið settur verður, kemur at arbeiða í einum mennandi arbeiðsumhvørvi saman við góðum starvsfeløgum og fær møguleikar at menna seg víðari, við at luttaka á ymsum skeiðum uttanlanda.

**Førleikakrøv**
Vit hugsa okkum, at tann sum settur verður, hevur útbúgving frá hægri lærustovni og hevur holla viðkomandi vitan, sum ger hann vælskikkaðan til starv av hesum slag. Umsøkjarar, sum umframt hollan ástøðiligan kunnleika, eisini hava praktiskar royndir innan alivinnuna, hava fyrimun.

Hevur tú hug til stórar avbjóðingar, eitt ábyrgdarfult, viðkomandi og mennandi starv innan føroysku alivinnuna, kunnu vit bjóða tær alt hetta, umframt góðar arbeiðsumstøður og møguleika at menna teg víðari.

Ynskiligt er at starvið verður sett skjótast gjørligt, men hinvegin hava vit eisini tíð at bíða eftir rætta viðkomandi, um so er at umstøður gera, at viðkomandi ikki er tøkur beinanvegin. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu, í mun til útbúgving og starvsroyndir.

Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast P/F Fiskaaling, Við Áir, FO 430 Hvalvík, í seinasta lagi 1. februar 2001. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at seta seg í samband við P/F Fiskaaling, Símun Joensen, stjóra, telefon 474747 ella 21 4747 og á teldupost adressu: simun.joensen@fiskaaling.fo.

*Við Áir 11.01.2001*

**P/F FISKAALING**

***Lýsing av P/F Fiskaaling***
P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Felagnum er álagt at standa fyri tí føroyska kynbótaarbeiðnum við laksi og sílum. Endamálið við kynbótaarbeiðnum, er at ala fram ein frískan fisk, sum hevur best møguligar eginleikar, soleiðis at føroyska alivinnan er betur kappingarfør á altjóða marknaðinum. Kynbótaarbeiðið byrjaði í 1991 og er seinastu árini ment, soleiðis at í dag verður valt út fyri allar eginleikar, sum til ber at hava við í kynbótaarbeiði við laksi. Fyrstu 5 árini hava 150 familjur verið tiknar við í kynbótaarbeiðnum, men frá 1999 at rokna er støðin víðari útbygd, soleiðis at til ber at hava 400 familjur við í úrvalinum. Eftir seinastu útbyggingina er føroyska kynbótaarbeiðið fult á hædd við kynbótaarbeiðið, sum verður gjørt í øðrum londum. Umframt at standa fyri kynbótaarbeiðnum er felagnum eisini álagt at menna nýggj fiskasløg til føroysku alivinnuna. Í hesum sambandi hevur felagið seinastu árini arbeitt við eini verkætlan innan aling av toski. Hendan er nú steðgað og felagið er farið í holt við eina verkætlan, sum hevur til endamáls at menna alingina av kalva. Sum liður í kynbótaarbeiðnum framleiðir felagið hartil 2000 - 3000 litur av laksarognum árliga umframt nakað av sílarognum. Samlaði umsetningurin í felagnum seinastu árini hevur verið umleið 25 mill. kr.